# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Muslimski heimurin væntar, at tit stríðast í felag í Irak, tí endamálið kemur fram um alt*

*(Osama Bin-Laden)*

# Bøna og biðja fólk flýggja

**Myndugleikarnir í Kalifornia ásanna, at teir hava ikki tamarhald á skógareldunum. Minst 500 hús eru brunnin í grund**



*Meiri enn 250.000 fólk eru flýdd undan teimum ógvusligu skógareldunum í Kalifornia*

- Skundið tykkum burtur, áðrenn eldurin kemur!

Myndugleikarnir í Kalifornia bøna og biðja fólk sleppa sær til rýmingar undan teimum 14 skógareldunum, sum herja har suðuri í statinum. Arnold Schwarzenegger, guvernørur, hevur lýst fleiri øki í undantaksstøðu, og í morgun setti hann 1.500 mans hjá tjóðarhirðini at hjálpa teimum ovbyrjaðu sløkkiliðsmonnunum.

Men umstøðurnar at sløkkja eldarnar kundu valla verið verri. Tað hevur verið óvanliga turt leingi, teir seinastu dagarnar hevur vindurin verið rættiliga frískur, og veðurmenninir siga ikki frá nakrari broyting.

Myndugleikarnir siga, at hóast sløkkiliðini hava meiri enn 300 sløkkiliðsbilar, fleiri gravimaskinur og 20 flogfør og tyrlur, so hava eldarnir breitt seg teir seinastu dagarnar. Skaðin er eisini stórur. Umleið 500 hús eru brunnin í grund, og einir 100 handlar hava fingið somu lagnu, sigur CNN.

Serliga økið kring býin San Diego er meint rakt av skógareldunum. Har eru umleið 250.000 fólk rýmd frá húsi og heimi, og fleiri túsund fólk hava leitað sær skjól á einum stórum ítróttarøki í býnum.

# Yvirgangsmenn fingu frið í Danmark

**Fyrst í nítiárunum bleiv Danmark uppfatað sum eitt stað, har yvirgangsmenn gjørdu, sum teimum lysti**

Tað sigur Hans Jørgen Bonnichsen, fyrrverandi stjóri í fregnartænastuni hjá donsku løgregluni, við JyllandsPostin. Bonnichsen var stjóri í PET í árunum frá 1997 til 2006.

Í samrøðuni kemur fram, at longu í 1994 metti PET, at næstan 40 av heimsins ringastu yvirgangsfelagskapum høvdu støð ella umboð í Danmark, haðani teir útvegaðu pengar, følsk pass og hjálptu virknum yvirgangsmonnum.

Yvirgangsmenninir gjørdu sær eisini dælt av tí lagaliga danska innflytarapolitkkkinum, sum tá var. Millum teirra, sum fjaldu seg í Danmark, vóru Omar Abdel-Rahman og Abu Talal. Teir vóru limir í einum egyptiskum yvirgangsfelagsskapi, sum verður hildin at vera ein partur av al-Qaeda.

- Trupulleikin var helst, at tá var markið ímillum yvirgang og frælsisbardaga ikki so týðiligt sum í dag, og harafturat hevði PET ikki somu amboð sum í dag, sigur Hans Jørgen Bonnichsen við Jyllands-Postin. Blaðið hevur roynt at fáa eina viðmerking frá Bjørn Westh, sum var løgmálaráðharri í 1995, men hann vil einki siga. Tað vil núverandi løgmálaráðharrin, Lene Espersen, heldur ikki, og PET sigur seg ikki hava nakað at viðmerkja.



*Hans Jørgsen Bonnichsen var leiðari í PET frá 1997 til í fjør*

## STUTT SAGT

### Iran eingin hóttan

Tað fara at ganga millum trý og átta ár, áðrenn Iran verður ført fyri at gera kjarnorkuvápn, sigur ovastin í fyri altjóða kjarnorkustovninum IAEA, Mohammed ElBaradei. Hann sigur, at altjóða samfelagið hevur góða tíð til at ávirka iranska stýrið, og sjálvur ivast hann ikki í, at tann diplomatiska kósin er tann rætta. Hinvegin ávarar hann ímóti ov hørðum tiltøkum. Mohammed ElBaradei sigur við franska blaðið Le Monde, at allar fregnartænastur eri á einum máli um, at Iran verður ikki ført fyri at fáa sær kjarnorkuvápn fyrr enn í fyrsta lagi um trý ár.

### Pavarotti stóra skuld

Tá italski operasangarin Luciano Pavarotti doyði herfyri, varð sagt, at hann átti pengar og virðir fyri næstan hálva aðru mia. krónur. Nú vísir tað seg, at støðan var ein heilt onnur. Í veruleikanum skyldaði Pavarotti bankanum 85 mió. krónur, nú hann doyði, og harafturat hevði hann lænt 54 mió. krónur, sum hann ikki hevði goldið aftur. Tað skrivar italska blaðið La Republica. Kortini hevði Pavarotti onga neyð. Hann átti minst fýra íbúðir í New York og Monte Carlo umframt eini stór hús í Pesaro í Italia og fleiri virðismikil listaverk, skrivar La Republica.

### Seinur postur

Ein 80 ára gamal maður í Japan fekk ein hvøkk nú um dagarnar, tá hann fekk eitt postkort frá einum vinmanni, sum doyði undir seinna heimsbardaga. Á kortinum sæst, at vinmaðurin hevði sent tað við postinum úr Burma í 1943. Tað vísti seg, at postkortið kom til Nagasaki í Japan, men at ein amerikanskur hermaður hevði tikið tað við sær til USA í 1945. Í 1970 gav hann einum soni kortið. Sonurin búði á Hawaii og segði einum japonskum vinmanni frá tí sjáldsama kortinum. Saman fóru teir at kanna málið, og 64 ár seinkað fekk tann rætti eigarin postkortið, skrivarAP.